# Vesturvarði góðan túr

**Royndu í seks dagar og fingu 210.000 pund av góðum upsa**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

**Tvøroyri:** Mikudagin var trolarin, Vesturvarði, á Tvøroyri við 210.000 pund av upsa, sum teir fingu í seks dagar.

Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at hetta var alt stórur og góður upsi, 1, 2 og 3'arar, sum hann tekur til.

Hósdagin landaðu Rankin og Research á Tvøroyri. Hin fyrri hevði 100.000 pund av kongafiski og svartkalva, hin seinni 100.000 pund av góðum upsa.



*Vesturvarði var á Tvøroyri við 210.000 pundum av umsa mikudagin. Á Fiskavirking á Tvøroyri hava tey arbeitt til kl. 19 alla hesa vikuna, og væntandi fara tey eisini til arbeiðis í dag, leygardagin. Í vikuni hava tríggir trolarar lagt veiðina upp á Tvøroyri og væl er komið uppá land av útróðrarfiski*

### Góður útróður

Veðrið hevur verið gott seinastu dagarnar, og væl hevur vignast hjá útróðrarbátunum á Tvøroyri.

Bjarni sigur, at hósdagin løgdu bátarnir eini 30.000 pund av útróðrarfiski upp á Tvøroyri.

– Teir flestu royna við snellu, onkur við línu. Fleiri bátar við snellu lógu millum 800 og 1200 pund. Slagið, teir fáa, er smáttfallandi toskur.

– Virkisleiðarin sigur, at tað eru fleiri ár síðan, at so góður útróður hevur verið á Tvøroyri.

### Nógv fiskaarbeiði

Á Fiskavirking á Tvøroyri hava tey arbeitt hvønn dag hesa vikuna til kl. 19.00, og tá ið vit frættu í gjáramorgunin, væntaði Bjarni Hansen, at tey eisini fóru til arbeiðis í dag, leygardagin.

– Og vit vænta, at tað verður nógv at gera í komandi viku, leggur hann aftrat.

# Sjálvstýrisstríð í Fólkatinginum

**Stríðið millum loysing og samband í føroysku søguni flutti inn í Fólkatingið eina løtu seinnapartin hósdagin. Nýggja bókin hjá Hans Jacob Debes, Færingernes Fremtid, varð løgd fram fyri fólkatingslimum og øðrum áhugaðum. At áhugin fyri bókini er stórur, vitnar sølan um. Fyrsta upplag er næstan útselt og annað upplag kemur um stutta tíð**

FØROYA SØGA
*Magnus Dam*
*Christiansborg*



*Steen Cold skipaði fyri samkomuni á Christiansborg hósdagin, har hann greiddi frá bókaútgávuni*
*Mynd: Magnus Dam*

Eini 40-50 fólk vóru komin saman til samkomuna í Fólkatinginum hósdagin, sum Norðurlandaráðið skipaði fyri. Talan var bæði um fólkatingslimir, fyrrverandi ráðharrar, føroyingar búsitandi í Danmark og onnur áhugaði í føroyskum viðurskiftum.

Áhugin fyri bókini hjá Hans Jacob Debes er stórur. Talan er um fyrstu bókina í nógv ár um Føroya søgu, sum er skrivað av einum føroyingi á donskum. Hóast bókin ikki hevur verið í bókasølunum í meira enn nakrar fáar dagar, er hon nógv umbiðin. Fyrsta upplagið er næstan útselt, og annað uplag verður prentað og verður í bókasølunum um stutta tíð.

Steen Cold, skrivstovustjóri í Norðurlandaráðnum, hevur saman við øðrum staðið fyri útgávuni í Danmark. Hann fegnast um, at áhugin fyri bókini og føroyskum søguligum viðurskiftum tykist vera stórur eisini uttanfyri Føroyar. Hann hevur sjálvur stóran áhuga í føroyskum viðurskiftum, og stavar hesin ikki minst frá tíðini, hann sat sum fyrsti stjórin í Norðurlandahúsinum í Føroyum.

Steen Cold skipaði fyri samkomuni á Christiansborg hósdagin, har hann greiddi frá bókaútgávuni. Sjálvur rithøvundurin, Hans Jacob Debes, kundi tíverri ikki vera til staðar, men heilt uttan føroyskt íslett var samkoman ikki. Annika Hoydal, sjónleikari og sangkvinna, sum er búsitandi í Danmark, bar fram yrkingina Várstrond eftir H. A. Djurhuus til stóra frøði hjá gestunum.

Færingernes Land – historien om den færøske nutids oprindelse – skal upplýsa danir og norðurlendingar um føroysku søguna og um, hvussu spjaddir føroyingar standa og altíð hava staðið í spurninginum um tilknýtið til Danmark.

Føroyska søgan er rík, og sambært fyrrverandi blaðstjóranum, Henning Fonsmark, er bókin eitt kærkomið høvi at seta seg inn í viðurskiftini í Føroyum.

– Bókin eigur at minna donsku lesararnar um, at tað er ein heiður fyri okkum at fáa loyvi til at vera partur av teirra søgu. Tað øvugta hevur ikki altíð gjørt seg galdandi, sigur Henning Fonsmark um bókina hjá Hans Jacob Debes, professara.



# Løgin fráboðan

**Løgtingsmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum heldur tað vera løgið, at fólk fara í Sjónvarpið at boða frá, at tey ætla sær at stilla upp til løgtingsval og bjarga flokkinum**

UPPSTILLING
*Edvard Joensen*

Tað er løgið og ørkymlandi at útnevna valevni í fjølmiðlunum, uttan at nakar uppstilingarfundur hevur verið, ella at valfelagið kennir nakað til nakra útnevning.

Soleiðis málber Kári P. Højgaard, tingmaður Sjálvstýrisfloksins, seg, tá hann verður biðin um viðmerking til, at Lasse Klein hevur boðað frá, at hann ætlar at stilla upp til løgtingsvalið fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoy.

Kári Højgaard ynskir Lassa Klein væl afturkomnum í Sjálvstýrisflokkin, men heldur, at hann kundi gott farið eitt sindur spakuligari avstað, áðrenn hann boðar frá, at hann skal bjarga flokkinum.

Kári Højgaard vísir á, at tað stendur nú ikki so illa til í Sjálvstýrisflokkinum kortini, at tað ikki fæst meira enn eitt valevni at stilla upp til komandi løgtingsval.

Valdur tingmaður í Eysturoy er í løtuni Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, og í hansara stað situr Kári Højgaard á tingi. Teir kunnu helst, hvør í sínum lagi, geva Lassa Klein kapping, heldur Kári Højgaard.

Hann leggur dent á, at tað er sjálvandi ikki vist, at so verður, tí einki er avgjørt. Men verður heitt á hann um at stilla upp, fer hann at gera tað, sigur hann.

Formaðurin í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, Ingvard Olsen, váttar, at eingin uppstillingarfundur hevur verið, og sostatt er heldur einki gjørt av, hvør ella hvussu stillað verður upp.

Hinvegin váttar hann, at Lasse Klein hevur limað seg inn aftur í Eysturoyar sjálvstýrisfelag, og harvið Sjálvstýrisflokkin, eftir at hava verið ein túr í Kristiliga Fólkaflokkinum og vent.

Men tað eru onnur enn Lasse Klein, sum eru vorðin limir í Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, sigur formaðurin. Tað hava fleiri nýggir limir teknað seg seinnu tíðina, sigur hann. Hann fegnast um, at tað tykist vera fólk í góðum árum, sum koma upp í felagið, og at tað sær út til, at tað kann vera onkur potentiellur komandi politikari uppi í.

Annars sigur Ingvard Olsen, formaður i Eysturoyar Sjálvstýrisfelag, at fyrsti uppstillingarfundurin verður heilt skjótt, og so fæst at vita, hvør kann nevna seg valevni til løgtingsvalið.



*Kári P. Højgaard heldur tað vera løgið, at Lasse Klein boðar frá, at hann er komandi valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum, uttan at leiðslan í valfelagnum veit nakað um tað*
*Mynd: Edvard Joensen*

Skemt og álvari á tingi:

# Seinasta nosið frá Sjálvstýrisflokkinum…

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*

Tøl eru turr, plaga vit at siga.

Tí var tað kanska heldur ikki so løgið, at onkur tingmaður gjørdist turrur í hálsinum, tá ið atkvøtt varð um fíggjarlógina undir aðru viðgerð á tingi hósdagin.

Andstøðan hevði ein hóp av broytingaruppskotum, sum atkvøðast skuldi um.

Hetta tók sína tíð, og tingfólk høvdu viðhvørt hug at práta eitt sindur millum atkvøðugreiðslurnar - og tá kann tíðin jú gerast uppaftur longri.

### Friðarligt og so…

Ein slíkan dag sær tingformaðurin, Finnbogi Ísakson, seg av og á noyddan at biðja tingfólk konsentrera seg um at atkvøða. Hann minnir tey á at tey tekna til og atkvøða.

Júst eina slíka løtu, tá ið tað er so deiliga friðarligt í tingsalinum, søkkur umboð Sjálvstýrisfloksins, Kári P. Højgaard, framyvir til aðra síðuna og ger eitt gevaldugt njós!

Nøkur tingfólk gerast so kløkk, at tey nærmast leypa upp úr stólunum, og hvør veit - kanska hugsaði onkur júst í hesi løtu um ógvusligu bumbingarnar yvir Tora Bora fjøllunum? Men tá ið tey fataðu, at tað bara var Kári, sum nýsti, rungaði láturin í tingsalinum. Og hann gjørdist ikki minni, tá ið tingformaðurin, Finnbogi Ísakson, gjørdi sína viðmerking:

"Hatta mundi vera tað seinasta nosið hjá Sjálvstýrisflokkinum….!" Og tá helt láturin fram…

Tað tók sína tíð at atkvøða um fíggjarlógina, sum hendan dagin var til aðru viðgerð, men at enda varð hon so samtykt í øllum góðum.

### Alt á køksborðinum!

Um tað var jólaveitslan hjá løgtinginum, sum skuldi vera kvøldið eftir, ið kanska skrúvaði "stemningin" eitt sindur upp, skulu vit lata vera ósagt.

Hinvegin hevur Kári P. Højgaard áður fingið allan tingsalin í látur, t.d. fyrr í heyst, tá ið lógin um postvirksemi var til viðgerðar.

Sjálvur er Kári postmaður, og í heimligum umhvørvi gongur hann undir navninum, Kári-post. So, hann kennir til alt, sum hevur við post og posttænastu at gera.

Tá ið viðgerðin fall á tey smáu posthúsini, kom Kári at siga ein setning, sum eisini fekk allan tingsalin í látur.

Hann tosaði um, hvussu hent tað er hjá fólki úti um landið at fáa postmannin inn á dyrnar, tí her "fáa tey allan sín tørv nøktaðan á køksborðinum", sum hann tók til.

Og tá var ikki minni látur í tingsalinum!


JÓLAKORT



*Kom inn og fá tikið eina fitta mynd í hugnaligum, føroyskum jólaumhvørvi*

10 jólakort v/brævbjálva, fotografering íroknað

TILBOÐSMYNDIR........ 99:-

VANLIGAR MYNDIR.... 130:-

ROYAL EXCLUSIVE v/12 royndarmyndum.......... 200:-

3arin

Fotodeildin, tel 35 35 34
SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: 3-arin@3-arin.com